

## ERT TÚ EIN SKRIVSTOVUMÚS?

Vit sóknast eftir einum skrivstovulærlingi!

Ert tú ágrýtin og fyrikomandi, og dámar tær væl at fáast við skrivstovuarbeiði, so er eitt lærupláss her hjá okkum kanska júst nakað fyri teg.

Sum lærlingur hjá okkum kemur tú millum annað at fáa hesar uppgávur:

- at svara telefonini
- kundaavgreiðsla
- bókhald
- tolling
- aðrar fyrifallandi uppgávur

Tú hevur HH-, FHS-, HF- ella studentsprógv, góðan málsligan kunnleika og dugir væl at brúka teldu.

Freistin at søkja lærupláss er 15. september 2010.

Send umsóknina við prógvskjølum og møguligum viðmælum til:

**Auto Service**
**Undir Krákugjógv 19**
**Postbox 3168**
**FO-110 Tórshavn**

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Pól Jákup Poulsen á tel. 34 54 00 ella teldupostadressu pjp@autoservice.fo

Auto Service er ein av fremstu bilasølunum í Føroyum. Í dag starvast 25 fólk deilt á verkstað, goymslu, bilasølu og umsiting.
Vit umboða merkini Peugeot, Opel, Nissan, Chevrolet og Saab.

**Auto Service**
www.autoservice.fo



## Sekstant Sp/f søkir eftir skipara

Sekstant Sp/f søkir eftir skipara til M/S Tinganes at byrja í september.

M/S Tinganes er ein sandbátur (undir 500 Brt.), ið siglir frakt í Noregi í løtuni. Siglt verður umleið seks vikur úti og seks vikur heima.

**Førleikakrøv:**

- Vinnubræv skipari v/handilsskipum STCW-reg II/2
- GMDSS
- Grundútbúgving sum sjúkraviðgeri
- Heilsuprógv
- Trygdarskeið
- Siglingarbók
- Pass

**Løn og setanartreytir:**

Verður sett eftir avtalu. Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera okkum í hendi skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja tel. 21 60 24 ella við telduposti: emil.sekstant@gmail.com.

**Sekstant Sp/f**
**Sigmundargøta 20**
**FO-100 Tórshavn**



**Mentamálaráðið**

## Stjóri til Søvn Landsins

**Hevur tú hugsjónir og hegni at føra Søvn Landsins inn í framtíðina?**

**Starvið**
Vit søkja eftir stjóra til at leggja saman og leiða søvnini undir Mentamálaráðnum. Stjórin skal hava hollan kunnleika til savnsøkið og skal harafturat hava fakligar, fyrisitingarligar og menniskjansligar eginleikar, ið kunnu lyfta týðandi uppgávuna at leggja landsstovnarnar á savns-, skjalasavns- og bókasavnsøkinum saman og føra søvn landsins inn í framtíðina.

Til at føra tilgongdina á mál og leiða stovnin leita vit eftir stjóra, sum megnar at leiða og menna samanlagda stovnin, sum megnar at skapa røttu sambondini út um stovnin, og sum megnar at motivera síni starvsfólk, so at tey trívast og mennast í sínum arbeiði. Saman við sínum starvsfólki og í samráði við Mentamálaráðið skal stjórin skipa samanlagda stovnin bygnaðarliga.

Søvnini verða, sum er, verandi, har tey eru nú, og stjórin fær í fyrsta umfari skrivstovu, sum Mentamálaráðið vísir á.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving innan savns- ella mentanarøkið frá hægri lærustovni og hollan kunnleika til savnsøkið. Umráðandi er, at umsøkjarar hava góðar leiðslueginleikar, ið kunnu menna eitt fakligt, virkið og kreativt umhvørvi á stovninum. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til mál og til at samstarva og samskifta bæði inn- og úteftir.

Vit vita, at avbjóðingin er stór, og at krøvini til stjóran eru høg. Samstundis er uppgávan spennandi, og stjórin fær møguleika saman við starvsfólkunum at skipa stovnin frá byrjan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett 1. desember 2010, ella so skjótt sum til ber. Setanarøkið er Mentamálaráðið og stovnar undir tí, og eigur tann, ið verður settur, at tola broytingar í starvinum. Stjórin verður løntur í 38. lønarflokki sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins, tó uttan at talan er um tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15%.

**Umsókn**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Næs, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, við telduposti til martinn@mmr.fo ella á telefon 555040.

Umsókn saman við prógvi, c.v. og viðkomandi skjølum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 28. september 2010.

Umsóknir skulu sendast til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72, Postrúm 3279
110 Tórshavn
Ella við telduposti til mmr@mmr.fo

*Søvn Landsins verður sett á stovn 1. januar 2011. Søvn Landsins er ein yvirskipað fyrisiting av søvnunum undir Mentamálaráðnum: Føroya Landsbókasavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Fornminnissavn, Føroya Náttúrugripasavn og Havlívfrøðiligu Royndarstøðina. Listasavn Føroya er eisini partur av tilgongdini. Virkisøkið fevnir um náttúru- og mentanarsavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi og bókasavnsvirksemi. Umleið 70 fólk starvast á søvnunum, sum í løtuni húsast á tólv ymiskum støðum.*



## Astrologi skeið

Astrologi skeið verður tann 16.-17. oktober.

Tilmelding áðrenn 17. september.

*olsen1208@gmail.com*



**Lesið Sosialin**